Fiskapakkin fullkomiliga miseydnaður:

# Føroysk virki sleppa ikki at bjóða uppá fiskin

**– Eitt høvuðsendamál við Fiskapakkanum var at steðga proforma-sølunum, men tað er fullkomiliga miseydnað, tí tær halda fram akkurát sum fyrr, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum**

FISKAPAKKIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Nú fiskapakkin er komin í gildi, eru ráfiskakeyparar í verri støðu enn vit vóru frammanundan, sigur Andreas F. Hansen, formaður í Ráfiskakeyparafelagnum*

– Fiskapakkin hevur verið eitt stórt vónbrot.

So bersøgin er Andreas F. Hansen, formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Tá ið Fiskapakkin varð settur í gildi, var eitt høvuðsendamál at steðga proforma-sølunum, har fiskur fer óvirkaður av landinum, uttan at føroysk virki hava fingið ein veruligan møguleika at bjóða uppá hann.

Men nú Fiskapakkin bara hevur verið í gildi í knappar tvær vikur, kann formaðurin í Ráfiskakeypararafelagnum longu staðfesta, at hesin parturin av honum er fullkomiliga miseydnaður.

– Proforma-sølurnar halda fram, akkurát sum tær gjørdu áðrenn fiskapakkin varð settur í gildið.

Hann sigur, at ráfiskakeypararnir eru so mikið vónbrotnir og ónøgdir við Fiskapakkan, at teir fara ikki at lata hetta fara afturvið borðinum.

Men hvat Ráfiskakeyparafelagið fer at gera við støðuna, veit hann ikki enn.

– Tað fer felagið at viðgera eftir summarferiuna, táið tað ber til at savna nevndina aftur. Hetta er undir øllum umstøðum eitt mál, sum vit fara at taka upp, tí støðan er enn líka vánalig, sum hon var frammanundan.

### Brot á semju í vinnuni

Andreas F. Hansen leggur dent á, at tá ið Fiskapakkin varð snikkaður til, samdust bæði ráfiskakeyparar, sum eru flakavirkini og ráfiskaseljarar, sum eru skipini, um eitt tilmæli til landsstýrismannin sum skuldi hava til endamáls at fáa enda á proforma-sølunum.

Í tilmælinum til landsstýrismannin, vóru ráfiskakeypararnir og ráfiskaseljararnir eisini samdir um, at útlendingar skuldu sleppa at bjóða uppá fiskin.

– Tað er hetta uppskotið frá vinnuni, sum er grundarlagið undir Fiskapakkanum.

Men nú proforma-sølurnar halda fram ótarnaðar, staðfestir formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, at nakrir ráfiskaseljararnir snúgva sær uttanum hesa semjuna, teir gjørdu við keypararnar.

Men tá ið skipini gera hetta, er tað helst tí at tað loysir seg best?

– Tað vita vit ikki, tí í veruleikanum sleppur tað ikki at standa sína roynd.

### Mugu hava ein veruligan møguleika

Sjálvur er Andreas F. Hansen ímóti politiskari uppílegging í vinnuna.

Men í hesum føri heldur hann, at tað slepst ikki uttanum.

– Minsta krav má vera, at allir keyparar fáa ein veruligan møguleika at bjóða uppá fiskin, sum verður fiskaður undir Føroyum. Tað átti ikki at verið so trupult hjá øllum at samst um.

– Tað eru ikki bara fiskavirkini, sum ikki sleppa at bjóða uppá fiskin. Tað eru eisini aðrir útflytarar, sum heldur ikki sleppa at bjóða, tí støðan er tann, at tað eru bara teir, sum frammanundan hava avtalur við skipini, sum heldur ikki sleppa at bjóða.

Hann sigur, at kappingin um fiskin er rættiliga hørð og møguliga klára føroysku virkini ikki at keypa fiskin kortini.

– Men tað er ikki tað, sum hetta snýr seg um. Hetta snýr seg um varðeita eina aðalreglu um at allir keyparar skulu hava veruligar og javnbjóðis møguleikar at bjóða uppá tann fiskin, sum verður fiskaður undir Føroyum.

– Vit eru ikki bangin fyri fríari kapping. Men so skal tað vera fría kapping, men tað er tað ikki ídag.

Hann sigur, at í veruleikanum eru fiskakeypararnir verri fyri nú, enn teir vóru áðrenn Fiskapakkin varð settur í gildið.

– Eitt er, at proformasølurnar halda fram sum áður, men nú sleppa afturat eisini útlendingar at bjóða uppá fiskin.

– Sostatt hava ráfiskakeyparar fingið akkurát onki burturúr Fiskapakkanum, sigur Andreas F. Hansen.

# Proforma-sølur fyrr og nú

**Mannagongdin er broytt eitt lítið sindur, men Fiskapakkin hevur ikki megnað at forða fyri proforma-sølunum**

ÓVERULIGAR SØLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fiskapakkin hevur ikki megnað at forða fyri teimum óverligu sølunum av fiski.

Tað siga bæði Andreas F. Hansen formaður í Ráfiskakeyparafelagnum og aðrir fiskakeyparar, vit hava tosað við.

Teir siga, at Fiskapakkin hevur gjørt, at tað hevur verið neyðugt at broyta mannagongdina í sambandi við proformasølur eitt sindur, men úrslitið er tað sama og tað er, at tær halda fram ótálmaðar, akkurát sum tær gjørdu, áðrenn fiskapakkin varð settur í gildið.

Fyrr fóru proformasølurnar soleiðis fram, at fiskakeyparar avtalaðu við skip um at keypa fiskin frá teimum.

Fyri at kunna flyta fiskin óvirkaðan av landinum, máttu fiskakeyparin fyrst bjóða fiskin til sølu á føroyska marknaðinum. Men har setti keyparin so høgan minstaprís, at ongin kundi keypa uttan hann sjálvur. Sostatt keypti keyparin fiskin frá sær sjálvum og rindaði sær sjálvum prísin fyri fiskin. Nú kundi hann so ávísa, at fiskurin hevði verið bjóðaður út á føroyska marknaðinum, men at ongin hevði keypt og tí var tað lógligt at flyta hann av landinum.

Síðani fiskapakkin kom, er mannagongdin broytt eitt sindur, men úrslitið er akkurát tað sama, siga fiskakeyparar.

– Nú stendur tað í lógini, at tað er loyvishavarin, altso skipið, sum skal bjóða fiskin út á marknaðin í Føroyum. Tað, sum nú hendir, er, at skip og keyparar gera avtalur sínamillum, akkurát, sum áður.

Men nú hendir tað, at skipið gevur fiskakeyparanum fulltrú til at handla fiskin vegna skipið. Sostatt bjóðar skipið fiskin á marknaðin, men ásetir so høgan minstaprís, at ongin kann keypa, uttan keyparin, sum avtala er gjørd við frammanundan. Keyparin fær síðani fiskin og nú kann eisini vísast á, at fiskurin hevur verið bjóðaður út og at tað tí er lógligt at at flyta hann óvirkaðan av landinum.

Tá ið fiskurin síðani er endaliga seldur, verður »yvirprísurin« bara millumroknaður ímillum skipið og keyparan í Føroyum, sum flytir fiskin út.

– Tað eru dømi um, at skip hava sett hýsu trý til sølu á fiskamarkn-aðinum fyri 25 krónur fyri kilo, hóast marknaðarprísurin neyvan er meiri enn 15 krónur, siga fiskakeyparar. Keyparin, sum avtala er gjørd við frammanundan, keypir síðani hýsuna fyri 25 krónur, og selur síðani hýsuna aftur fyri 15 krónur og yvirprísurin uppá 10 krónur, verður síðani millumroknaður aftur ímillum skipið og keyparan, siga fiskakeyparar.

Fiskamarknaðurin:

# Proforma-sølur halda fram

**Fiskapakkin hevur ikki megnað at steðga proforma-sølunum, men fyribils er tær ikki líka umfatandi nú, sum tær vóru frammanundan, sigur stjórin í Fiskamarknaðinum**

PROFORMA-SØLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fiskapakkin hjá landsstýrinum hevur ikki megnað at steðga proforma-sølunum.

Tað staðfestir Jens Kristian Olsen, stjóri í Fiskamarknaði Føroya.

Men hann sigur at fyribils í hvussu so er, fara tær ikki fram í líka stóran mun sum frammanundan.

Sjálvur vil stjórin í Fiskamarknaðinum treyðugt brúka orðið proforma-sølur.

Men hann sigur, at higartil hava teir bara staðfest at útróðrarfiskur verður sendur á marknaðin sum tað ber til at siga ikki er til sølu kortini, men teir hava ikki staðfest, at skipini gera tað. Endamálið við hesum slagi av sølu er í veruleikanum at fáa eina váttan fyri at fiskurin kann flytast óvirkaður av landinum.

Kunsturin er sostatt at bjóða fiskin út á ein hátt soleiðis at ongin kann fáa fatur á honum, uttan tann ávísi keyparin.

Tað verður gjørt við at áseta óveruligar minstaprísir á fiskin, men tað kann eisini gerast við at áseta so ólagaligar leveringsstíðir, at ongin kann keypa fiskin.

– Vit kunnu staðfesta, at hetta slagi av sølum fer fram enn, men tað er ikki í líka stórum stíli sum fyrr við tað, at vit higartil bert hava staðfest, at útróðrarfiskur verður seldur á hendan hátt, samstundis sum vit ikki hava staðfest, at skipini gera tað.

Men Jens Kristian Olsen sigur, at tað skapar rættiliga stóra ónøgd á marknaðinum,

– Tað er rættiliga forstýrandi fyri marknaðin, at fiskur er til sølu, sum í veruleikanum ikki er til sølu kortini, sigur hann.

# Proforma-sølur skulu steðgast

**Eru trupulleikar framvegis við proforma-sølum, skal okkurt gerast við tað, sigur Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum**

PROFORMA-SØLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Eru tað framvegis trupulleikar við proforma-sølum, skal okkurt gerast við tað.

Tað sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Hann sigur, at hann kennir ov lítið til tær proforma-sølur, sum ráfiskakeyparar nú siga seg hava staðfest, til at hann kann gera viðmerkingar til tað.

Men hann staðfestir, at endamálið við Fiskapakkanum var at fáa eina veruliga kapping um fiskin og at steðga proforma-sølunum.

– Vit fylgja við gongdini og hevur tað ikki eydnast at steðga proforma-sølunum við Fiskapakkanum, er tað ein spurningur, sum vit mugu taka upp, tí tær skulu steðgast, so ella so, sigur Bjørn Kalsø, tí tað skal vera ein verulig kapping um fiskin.